Álit

í

løgtingsmáli nr. 73/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin) (Flyta innkrevjing, ábyrgd og málsviðgerð av heilsutrygdargjaldi til TAKS at umsita)

Margit Stórá, landsstýriskvinna, hevur lagt málið fram 27. januar 2026, og eftir 1. viðgerð tann 5. februar 2026 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 19. februar 2026.

Við verandi lóggávu krevur TAKS heilsutrygdargjaldið inn fyri Heilsutrygd, meðan Heilsutrygd ber kostnaðin av hesum. Við lógarbroytingini verður hetta broytt, soleiðis at TAKS umframt innkrevjing av heilsutrygdargjaldinum eisini hevur ábyrgdina av hesum. Heilsutrygd skal sostatt heldur ikki frameftir gjalda TAKS fyri hesa uppgávu. Samsvar fæst eisini millum vald og gjald, við tað at stjórin hjá TAKS frameftir hevur ábyrgdina av hesari uppgávuni umframt ber kostnaðin av hesum.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 19. februar 2026

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstforkvinna	Kaj Leo Holm Johannesen
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	